


## Marknaðarfólk til Bókadeild Føroya Lærarafelags – royndarsett til 1. juli 2009

Bókadeild Føroya Lærarafelags søkir eftir marknaðarfólki at byrja skjótast til ber.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um at kunna um okkara útgávur og røkja heimasíðurnar, skipa fyri sølufremjandi átøkum o.tl.

Til starvið krevst viðkomandi yrkisligur førleiki, góður kunnleiki í føroyskum, og áhugi og grundleggjandi vitan um bókmentir.

Løn og setanartreytir eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bókadeildina á tlf. 317644, ella á bfl@bfl.fo

Skrivlig umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og møguligum viðmælum skal vera Bókadeildini í hendi 24. oktober 2008:

Bókadeild Føroya Lærarafelags
Postrúm 3264
FO-110 Tórshavn

**Bókadeild Føroya Lærarafelags**
Pedda við Stein gøta 9
100 Tórshavn

**Bókadeild Føroya Lærarafelags** er stovnur undir Føroya Lærarafelag, sum varð stovnaður í 1956. Forlagið gevur fyrst og fremst út barna- og ungdómsbøkur, men eisini aðrar bókmentir, einar 50 – 60 um árið tilsamans. Umframt hevur forlagið um hendi barnablaðið Strok og Skúlablaðið. Á Bókadeildini starvast fýra fólk: eitt í fullum starvi, eitt í ¾ og tvey í ½ starvi.



## SRI Máling søkir starvsfólk

Til deild okkara í Havn verður søkt eftir starvsfólki k/m at byrja sum skjótast. Ert tú fryntlig(ur) og dugir væl við fólki. Hevur tú kunnleika til teldu á brúkarastøði og ert áhugað(ur) í søluarbeiði og hevur koyrikort til bil, so send nakrar linjur um teg sjálva(n) við upplýsing um aldur, útbúgving og møguligar starvsroyndir til:

SRI Máling Sp/f
Lucas Debesargøta 6
FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 30 30 · Fax 31 30 16

SANDAVÁGS KOMMUNA

## VALLISTIN TIL KOMMUNUVALIÐ

Vallistin til kommunuvalið tann. 11. november liggur frammi á kommunuskrivstovuni til alment eftirlit í tíðarskeiðnum 14. okt. til 11. nov.

Sandavágs Kommuna
www.sandavagur.fo

Hammershaimbsvegur 1 · FO-360 Sandavágur
Tel. +298 332 470 · Fax. +298 333 470
sandavagur@sandavagur.fo

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

## Sethús og stórt grundøki yviri við Strond 57

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 659 a, Tórshavn, seld.

Talan er um eina serstaka ogn, ið liggur ógvuliga væl fyri við fríum útsýni yvir fjørðin og Nólsoynna. Partur av grundøkinum er plantað við m.a. stórum trøum. Økið omanfyri húsini er bøur. Umframt sethúsini er á økinum hjallur og gamalt fjós við laðaðari grund.

Grundøkið er 3.057 m².

Húsini, sum eru bygd í 1956, eru í tveimum hæddum, hvør 136 m², alt innrættað. Í erva: Gangir, baðiverilsi, køkur, tvær stovur, hjúnarúm og trý kømur. Í kømrum og gangi eru innbygd skáp. Kjallari: Gangir, stór stova, trý kømur, wc/brúsa, fýrrúm, vaskikjallari, kjallararúm og goymsla. Fleiri innbygd skáp eru í niðaru hæddini.

Prísuppskot kr. 3.300.000,00.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til undirritaðu. Sí eisini heimasíðu okkara.

**Advokatskrivstovan**
Tel. 353335
att: Fríða Patursson, adv. frp@jura.fo ella skrivaran Maibritt Johannessen, maj@jura.fo

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo



*Eitt sindur hugnaligari...*

Hvat við at forkela teg sjálvan ella gleða onkran annan?

Tær góðu umstøðurnar kunnu vit bjóða tær.

Royn Luddastovu í Leynum ella Bakkastovu við Ljósá.

**BOOKING:**
**lp@ognir.fo ella tlf. 21 73 00**
**www.ognir.fo**
**www.wedding.fo**
**sí undir »veitarar« og »brúðarnátt«**

## Koyrikort til lastbil

## Eysturoyingar og Norðoyingar

Klaksvíkar Koyriskúli, ið hevur samstarv við Koyriskúlan í Tórshavn, byrjar nýtt skeið til lastbil tann 15. oktober 2008. Koyrt verður í Klaksvík og Eysturoynni.

Havi eisini góðkendan skúlavogn

**Tekning á tlf. 777777**

Klaksvíkar Koyriskúli · v/Manna Waag Høgnesen

## KVÍVÍKAR KVØLDSKÚLI

Veturin 2008/2009

**Treytað av nóg stórari luttøku hevur skúlin hesi tilboð í vetur:**

**Tøving/spinning: mánakvøld**
Margit Glerfoss/Herbjørg Dalsgaard
313660/312940/226488

**Hornarbeiði: vikuskiftir eftir avtalu**
Rasmus Nygaard 314816

**Møbilpolstring: vikuskiftir eftir avtalu**
Jóhannes Bláfoss 313710

**Luttøkugjaldið er kr. 300,-**
**Byrjað verður í viku 43**